Skeiĉfyriskipari er
Hans FrČĉi Hansen,
Image & Fashion Consultant

Taĉ ber til at melda seg
til ein av hesum dđgunum:
3. november - 18.00-22.30
4. november - 18.00-22.30
9. november - 18.00-22.30
10. november - 18.00-22.30
11. november - 18.00-22.30
12. november - 14.00-18.30
22. november - 18.00-22.30
23. november - 18.00-22.30
24. november - 18.00-22.30
25. november - 18.00-22.30

æ mesta lagi 20 luttakarar
kunnu luttaka ú hvđrjum skeiĉi.

PersČnligt skeiĉ um stĆl og mČta
verĉur ú Hotel Hafnia Ć november.

Ú skrúnni:
Hvat er stĆlur?
Finn tĆn egna stĆl.
Skapa tĆn egna stĆl.

Ú skeiĉnum bjČĉa vit úbit.
Kostnaĉur fyri skeiĉiĉ er kr. 600,- fyri hvđnn

Tilmelding viĉ at ringja til Hotel Hafnia,
tel 31 32 33.

h ^ v h ^ v
Hj ^ d b & Kfcbpqvib

Paradox í Miðlahúsinum

Nógvir bólkar og einstaklingar hava seinasta hálva árið spælt í Miðlahúsinum í Vágsbotni. Leygardagin kl. 17, eftir fótbóltsbrakið í Gundadali, verður tónleikabrak í Miðlahúsinum í Vágsbotni við Paradox og MTV dreingjunum The Dreams

Niels Uni Dam
nielsuni@sosialurin.fo

Popp punkararnir í Paradox hava í hesum døgum ferðast kring Føroyar og spælt konsertir í sambandi við útgávuna av fløguni "Falling in Love". M..a. hava teir spælt á skúlum. Leygardagin kl. 17 fara teir á pallin í Miðlahúsinum í Vágsbotni saman við The Dreams.

Bólkurin hevur, síðan Prix Føroyar var fyrr í ár, verið millum virknastu bólkar í landinum, men síðan summarfrítíðina hevur Paradox verið minnið virkin á konsertpallunum. Tveir av teimum trimum limunum eru staddir í Danmark á eftirskúla, og hetta hevur steðga framførslunum. Konsertin er tí eitt kærkomið høvi, at hoyra hendan frálíka bólk live.

Konsertirnar hjá bólkinum fyrr í ár vóru frálíkar og orkufyltar, og millum annað vóru teir um at koppa eina sera uppávegin krúnprinsessu við sínum kærleikspunksangum, tá Mary og Fríðrikur vitjaðu Margarinfabrikkina í Havn. Um hetta er nokk til, at føroyska íslettið til kongaliga navnið verður Heini, Búgvi ella Andreas, er ikki til at siga, men hvør veit.

Fløgan "Falling in love" er sera góð, men tað er ikki tað sama, sum at uppliva live kensluna. Tí snýr tað seg um at nýta hetta høvið at uppliva Paradox, áðrenn tveir triðingar av bólkinum verða útfluttir.

Miðlahúsið er síðan Sosialurin flutti í Vágsbotn vorðið eitt alsamt betur umtókt spælistað. Higartil hevur bæði rokkur, fólkatónleikur, klassiskur tónleikur, easy listening og gospel verið at hoyrt í húsinum, men í morgin verður fyrstu ferð, at man sleppur hoyra popp punk av tí paradoxala slagnum í Vágsbotni.

Ein annar av bólkunum á Margarinfabrikkini Fólkayvirltið spældi fyrr í ár í húsinum, og tá fingu teir tilboð um at luttaka á einum útlendskum tónleikafestivali, so pallurin í Miðlahúsinum kann verða ein lopfjøl til okkurt heilt stórt, Tað er tí uttan iva við nógvum spenningi, at Paradox skrúvar upp fyri forstyrkjarunum leygardagin.

Søluleiðari til Elektron

Elektron er í vøkstri sum veitari av hosting- og breiðbandstænastum, og vit søkja tí ein søluleiðara at fyriskipa marknaðarføringina og søluna til serliga vinnufyritøkur og almennar stovnar.

Sjálvt um marknaðurin er lutvís nýggjur, eru tænasturnar vit bjóða ikki. Vit hava í eitt langt áramál veitt ambætara- og skipanarrakstur umframt nettænastur til okkara kundar.

Talan er um nýstovnað starv, ið verður sera spennandi og avbjóðandi fyri rætta persónin og vit kunnu lova góðar starvsfelagar, sum altíð eru fúsir at hjálpa og vegleiða.

Vit rokna við at tú hevur hóskandi útbúgving og royndir frá samsvarandi starvi. Tað er týdningarmikið at tú hevur áhuga í og skil fyri tøkni og dugir at orða teg í skrift og talu.

Hevur hetta tín áhuga kanst tú senda eina umsøkn við prógvum og c.v. til Niels Chr. Nolsøe, P/F Elekron, Staravegur 9, 110 - Tórshavn, ella við telduposti til ncn@elektron.fo. Umsøknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 28. oktober 2005.

Hevur tú spurningar viðvíkjandi starvinum, ert tú vælkomin at seta teg í samband við Niels Chr. Nolsøe. Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Seinasta lagi fríggjadagin 28. oktober 2005.

Stephanssons Hús

P/F Elektron er heildarveitari av KT-tænastum. Okkara kundar eru m.a. føroysku peningastovnarnir, Toll- og Skattastova Føroya, Arbeiðsloysisskipanin og Almannastovan.
Størstu partaeigararnir eru Føroya Banki, Føroya Sparikassi og Føroya Landsstýri.
Á P/F Elektron starvast umleið 60 fólk og nettosølan var umleið 50 mió. kr. í 2004.

PF ELEKTRON
Staravegur 9 · P.O. BOX 3219
FO-110 Tórshavn
Tel.: +298 34 51 00 · fax: +298 34 51 01
e-mail: info@elektron.fo

Elektron